# Hvussu er stjølurin á kommunukassanum Heðin?

**- opin fyrispurningur til landsstýrimannin í kommunumálum**

TÓRBJØRN JACOBSEN



Laksáfoss hevur mist tamarhaldið á landsbúskapinum, um hann nakrantíð hevur havt tað, og er farin undir at selja bílig atgongumerki til eina politiska framtíð ístaðin. Harvið ger hann bara tað sama sum so mangir aðrir samgongumenn í hesum døgum, nú uppskot í fleiri hundrað milliónа klassanum floyma inn á tingborð, sum ongin dekningur er fyri, hvørki nú ella í komandi valskeiði. Tey, sum verða vald á ting 19. januar, hava longu mist dispositiónsrættin yvir fíggjar- og búskaparpolitikkinum, um hesin gallskapurin ikki verður steðgaður alt fyri eitt. Løgmaður roynir tó í besta Mugabe stíli at herja á demokratisku skottini, fyri at útvega sær meira tíð í samfelagsligu destruktiónsætlan síni. Ímeðan er evsta mark farið fyri spurningum á tingi - hjá okkum deyðiligu tingmonnum.

Landsins búskapur er so nógv annað enn fíggjarlógir Løgtingsins. Kommunurnar eru ein stórur partur, og sambært lógini um kommunustýri, § 53, stk. 2, skulu kommunurnar lata landsstýrismanninum í innlendismálum samtykta fíggjarætlan áðrenn 3 – tríggir - gerandisdagar eru farnir eftir 1. desember á hvørjum ári, fyri at landsstýrismaðurin kann røkja sínar eftirlitsskyldur við fíggjarligu viðurskiftunum hjá kommununum.

Harvið skuldi Heðin Zachariassen, sum nú varðar av kommunumálum í heimastýrisstjórn Føroya, havt fíggjarætlanir, løguætlanir og yvirlit yvir ognir og skuld í hendi, og vænti eg tí, at hann svarar hesum spurningum alment, táið ongin røkkur honum longur í parlamentarisku skipanini - við viðkomandi og avgerandi spurningum:

Hvussu stórar eru samlaðu inntøkurnar hjá kommununum samsvarandi fíggjarætlanunum fyri árið 2008?

Hvussu stórar eru samlaðu útreiðslurnar hjá kommununum samsvarandi fíggjarætlanunum fyri árið 2008?

Hvussu stórar eru samlaðu íløguætlaninar hjá øllum kommununum samsvarandi fíggjarætlanunum fyri árið 2008?

Hvussu stórur var samlaði íløguvøksturin í krónum og prosentum, samsvarandi fíggjarætlanunum hjá føroysku kommununum, frá 2004-2005, frá 2005-2006, frá 2006-2007 og frá 2007-2008?

Hvussu nógv er samlaða nettoskuldin hjá føroyskum kommunum broytt frá 1. januar 2004 – 31. desember 2007 ?

Flestu, ella allar, kommunur hava latið sínar fíggjar- og løguætlanir til Innlendismálaráðið longu 1. desember, so lagað manni skuldi tað verið, at greitt fólkið frá hesum. Tað mest áhugaverda við svarinum verður sjálvandi, um kommunubúskapurin virkar stabiliserandi ella destabiliserandi fyri heildarbúskapin, nú samgongan fullkomuliga hevur slept teymunum á landsins finansum. Fyri at nevna dømir um hetta seinasta uppáhaldið, so fara einans fýra einstakar verkætlanir, flogvøllurin, Sandoyartunnilin, tunlarnir Norð um Fjall og Studentaskúlin í Hoydølum (sum Jokarin hjá Javnaðinum legði fram í gjárkvøldið, í einum merkiligum herðindi av opportunistiskum kvababbilsi, hóast hann atkvøddi ímóti at kalla sama uppskoti frá Tjóðveldinum hin 4. november 2005, einasta uppskotið, sum er lagt fram á ting um bygging av Studentaskúla í Tórshavn hesi 4 árini, ímeðan Javnaðarflokkurin hevur havt eitt standandi veto óvikandi inni í samgonguni, ímóti hesi ætlan, sum nú bráðliga gjørdist so áhugaverd fyri onkran teirra, bert tríggjar dagar fyri, at val átti at verið útskrivað) at tátta í eina hálva millard um ári í komandi valskeiði. Hetta er umleið tvífalt tað, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur sagt seg sinnaðan at brúka, ja, sum hann staðiliga hevur sagt var ráðiligt at brúka, í ovurhitaða búskapinum. Og tá er ongin onnur íløga íroknað, tíanheldur røkt og viðlíkahald av landsins undirstøðukapitali.

Samstundis, sum vit gleða okkum til svarini frá Heðini, so mega vit vóna, at forløgini skipa tað soleiðis, at laðað verður upp í dyrnar hjá hesi samgonguni, ongantíð ov sjótt, skulu vit ikki enda í eini nýggjari og oyðandi kreppu. Tað kann ikki vera rætt, at eitt framkomið samfelag verður stjórnað av kreppum heldur enn av skilagóðum politiskum mekanismum.

# Var PISA eftirfarandi?

MARNAR SÚNASON KRISTIANSEN

PISA-næmingur
30. mars 2006



Eg kom í skúla. Tað var dagurin tá PISA-kanningin skuldi verða. Lærarin fortaldi okkum, at kl. níggju skuldu vit inn í høllina, til royndina, ið vardi fýra tímar.

Vit vistu ikki, hvat henda royndin gekk út uppá. Lærarin fortaldi, at royndin var fyri at vísa, hvussu væl vit dugdu, í mun til hini londini í heiminum. Helst fyri at stilla nervarnar hjá næmingunum segði hann, at hendan royndin kom ongantíð at síggjast aftur, at tað var púra anonymt. Vit fingu lítið og einki at vita um sjálvar uppgávurnar.

Klokkan bleiv so níggju, og vit fóru inn í høllina til royndina. Vit fingu handað nøkur hefti, og fingu at vita, at vit fingu ásetta tíð til hvørt hefti. Eygleiðararnir løgdu aftur dent á, eins og lærarin, at tað var ein anonym, og tað bleiv skilt sum at tað ikki var ein týdningarmikil roynd. Tá eygleiðararnir søgdu frá, kundu vit byrja.

Spurningarnir vóru fjølbroyttir, og nógvir eisini rættuliga løgnir. Nógvir av teimum vóru multiple choice spurningar, og í summum skuldi eg skriva, um eg var: Sera samdur, samdur, miðal, ikki samdur ella sera ósamdur. Summir vóru heilt løgnir: Útfrá einum miðallangum tekstpetti, skuldi ein finna svar uppá spurningar sum: Hvussu nógv hassj skal til fyri at drepa ein eiturkopp?

Tá eg endiliga bleiv liðugur, sá eg, at onnur eisini vóru givin at gera uppgávurnar. Summi, tí at tey eisini vóru liðug, men sjónin var dominerað av teimum, sum vóru givin, tí tey ikki tímdu at svara øllum teimum óviðkomandi spurningunum. Eg, og øll hini, sum vóru liðug, skuldu so bíða, til vit kundu byrja uppá næsta hefti. Sama mynstrið endurtók seg, inntil klokkan bleiv trettan, og royndin var liðug. Eg før tá heim við tí kenslu, at hatta mundi ikki hava verið so týdningarmikið.

Nú skjótt 2 ár seinni, veit eg at hendan royndin kom at hava nógv meira at siga, enn eg helt tá.

Tað var óheppið, at úrslitini av undankappingini ikki vórðu almannakunngjørd, áðrenn vit fóru upp til roynd. Tá hevði eg ivaleyst ikki verið farin avstað frá royndini við somu kensluni.

Ivaleyst er, at næmingarnir høvdu klárað seg betri, um tað var meira upplýst um hesar spurningarnar. Spurningar um hassj og eiturkoppar kunnu virka býttligir, um hann ikki veit, at svarið stendur í tekstinum við spurningin. Og av tí, at næmingurin ikki veit betur, velur hann at leypa teir spurningarnar um.

Nógvir av spurningunum vóru multiple-choice spurningar, og hetta er ikki nakað, sum eg hevði nógvar royndir við. Í okkara skúla gjørdu vit meira av øðrum uppgávum, og gjørdu mestsum einki við multiple-choice spurningar. Hesar, og eisini teir um hvussu einigur ein er, vóru ikki spurningar, ið eg, og onnur við mær, var vanur at svara, og av tí sama hevur hetta verið ein vansi fyri meg í hesi royndini.

Eg las í eini grein í Dimmu áðrenn úrslitini vóru kunngjørd, at nakrir granskarar høvdu sagt, at PISA ikki var eftirfarandi, av tí at hon legði seg ov nógv eftir enskari mentan. Tað, at eg ikki var vanur við multiple-choice spurningar vísir júst hetta væl. Av tí, at tað ikki verður lagdur dentur á júst hesi øki í føroyska skúlanum, kann ein so koma og siga at okkara skúli er vánaligari enn aðrastaðni?

Kann ein døma, um ein operasangari er ein betri sangari enn ein rokksangari??

Vit síggja, at tá føroyingar fara uttanlands, klára teir seg heilt væl. Minst líka væl sum tey úr hinum londunum.

Herfyri var ein kapping fyri børn í skúlaaldri: LEGO-League. Har fóru vinnararnir úr Føroyum til Danmarkar at kappast móti hinum Norðanlondunum. Tey føroysku børnini vóru um reppið at enda á fyrsta plássi, sum hevði givið teimum møguleikan at farið til Tokyo til HM. Tey endaðu tepurt á øðrum plássi, við bert Norra frammanfyri. Av øllum Norðanlondum.

Hetta vísir tað, at um børnini hava áhuga fyri einumhvørjum og eru motiverað, kunnu tey væl klára seg heilt væl!

Júst hetta hevur helst verið størsti trupulleikin við føroyingum í PISA-kanningini. Næmingarnir vistu ikki, hvat hendan royndin hevði at týða, og tí hava teir heldur ikki verið motiveraðir. Tað, at tað eisini varð lagdur dentur á, at royndin var anonym, hevur kanska virkað øvugt. Ístaðin fyri at hjálpa næmingunum, hevur tað gjørt at teir góðu næmingarnir ikki hava tímað, tí at teir ikki fáa viðurkenning fyri teirra arbeiði, og at teir minni góðu næmingarnir ikki hava lagt nakað í at fingið ring úrslit, tí at teir verða ikki straffaðir fyri tað.

Ivaleyst er at føroyska skúlaskipanin treingir til nakrar broytingar, men tað er als ikki so galið, sum royndin vísir.

Eg ivist ikki eina løtu í, at næstu ferð, tá vit eru meira fyrireikað, verða úrslitini nógv betri!

# Fleiri kvinnur á ting

Val



KRISTINA TOFTEGAARD LARSEN

Sjálvsstýrisflokkurin

Góðu føroyingar, góðu kvinnur og góðu menn.

Tað er við spenningi, at eg havi tikið hesa avbjóðing at stilla upp til Løgingsval. Hetta geri eg fyrst og fremst, tí at eg eri áhuga í politikki, og tí at eg ynski at hava ávirkan á, hvussu framtíðar Føroyar skulu síggja út. Eg havi fleiri hjartamál, og eitt teirra er, at fáa fleiri kvinnur inn á ting. Ikki bara tí, at eg haldi, at vit skulu hava fleiri kvinnur fyri kvinnuna skyld, men tí, at eg eri sannførd um, at vit fáa eitt betri Føroyar, um vit hava umboðan av bæði kvinnum og monnum.

So er tað møguliga nøkur, ið spyrja: "Ja, men er politikkur ikki bara fyri menn?" Mítt svar er: "Nei, politikkur er eisini fyri kvinnur". Kvinnurnar leiklutur hevur stóran týðning á øllum økjum í samfelagnum, eisini í politikki. Eg haldi, at tíðin er langt síðani komin, til at vit fáa eina størri breidd og eina betri javnvág í tingarbeiði. Og tað fáa vit bert, um vit hava bæði kvinnur og menn - saman. Higar til hava vit havt 1-2 ella 3 kvinnur á tingi av 32, og tað er virkuliga synd, tí heildarsjónin verður av tí sama alt ov skerpa.

Skulu vit liva upp til londini rundan um okkum, eiga vit verðuliga at taka okkum saman. Tað eru nógvar kvinnur, ið hava nógv at geva. Vit hava staðfestingar uppá, at kvinnur eru eins dugnaligar og menn í útbúgvingar-, arbeiðs-, og leiðsluhøpi, og tað eru vit eisnini í tinghøpi.

Latum okkum hesu fer virka fyri at fáa nóvg fleiri kvinnur inn á ting, - eisini sjálvstýriskvinnur.

Broytið krossin. Set hann við eina kvinnu.